# Nýggjur festivalur á veg

**Ein nýggjur tónleikafestivalur verður næsta ár, og hann verður í Kirkjubø í døgunum 16. - 18. juli. Millum stigtakaranar eru Mark Joensen og James Olsen úr Havn**

FESTIVALUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Nógvir festivalar hava verið seinnu árini, har av tríggir eru tiknir av skránni; G!, Mjús og Asfalt. Meðan teir báðir síðstnevndu hava latið lív, so rísir G! eftir øllum at døma uppaftur næsta ár. Nú er ein heilt nýggjur festirvalur á veg. Talan er um ein festival í Kirkjubø, sum hevur fingið fyribilsheitið, Føroya Festivalurin. Í hesum sambandi hava fyrireikararnir bjóðað til tíðindafund í Roykstovuni í Kirkjubø mánadagin klokkan 10.

- Vit ætla, at festivalurin skal verða eitt afturvendandi tiltak í Kirkjubø. Vit leggja dent á at fáa gott samstarv við kirkjubøfólk, har øll skulu kenna seg trygg, og har syrgt verður fyri at fáa nokk av eftirlitsfólki, soleiðis at festivalurin verður ein gleði fyri tey, sum búgva á staðnum, siga stigtakararnir, sum millum annað at telja Mark Joensen og James Olsen og Fróða Vestergaard.

Teir gera vart við, at øll óviðkomandi ferðsla undir festivalinum verður beind oman á Gomluræt.

- Stórur dentur verður lagdur á, at alt er reint og ruddiligt, bæði undir sjálvum festivalinum og aftaná, siga stigtakararnir. Teir hava sókt Tórshavnar Kommunu um at veita vatn og el-installatiónir, wc-vognar, brunavakt, ruskinnsavnan og aðrar tænastur.

Í innbjóðingini til tíðindafundin stendur, at ætlanin er at borðreiða við nøkrum av tí besta tónleikarliga, sum finst í Føroyum, eins og kend útlendsk nøvn vera á skránni. Harafturat verður skipað fyri undirhaldi til bæði børn og aðrar aldursbólkar.



*Fyribilsnavnið á festivalinum í Kirkjubø er Føroya Festivalurin. Fyrireikararnir hava boðað frá, at teir fara at avdúka nýtt navn á tíðindafundi, sum verður hildin í Roykstovuni í Kirkjubø mánadagin*






# Súrt lív í sjónum

Lívið í havinum hevur altíð verið ein týdningarmikil partur av fotosyntesuni í heiminum, har koltvíilta verður gjørd til ilt. Nú er trýstið tó vorðið so stórt, at havið ikki megnar at arbeiða undan. Hetta hevur eina stóra ávirkan á lívið í havinum, soleiðis at kolsýran, ið verður gjørd tá koltvíilta kemur í kontakt við sjógvin. Hetta hevur við sær, at havið gerst súrari og hetta skaðar lívið í havinum. Hetta hevur eisini við sær, at tað verður alsamt minni lív, ið megnar at gera koltvíiltu til ilt. Hetta vísa kanningar, ið eru gjørdar av amerikanum í Kyrrahavinum.

*Kelda: www.forskning.no*